# T FÓLK HER



**Grundøki**
eru at fáa í báðum bygdum. Við ársskiftið vóru 9 byggibúgvin øki tøk í kommununi - 1 í Miðvági og 8 í Sandavági.

## Ljósið lýsir enn

Um hugt verður eftir inntøkuni hjá kommununi so vaks hon tveir teir fyrstu mánaðirnar í ár.

Hetta kemur í fyrstu syftu av, at skattaprosentið varð hækkað í ár, samstundis sum oyggin, øll sum hon er, hevur lægsta arbeiðsloysið í landinum – 22 menn og 26 kvinnur.

Fleiri fólk úr kommununi gjørdust nevniliga arbeiðsleys, tá Fiskavirkið í Vestmanna lat aftur fyrr í ár.

Hóast tað altíð er harmiligt fyri tey sum verða rakt av arbeiðsloysinum, so verður víst í aðrari grein á, at tað ber til at liva eitt lív sum arbeiðsleysur.

– Eg harmist einamest um, at arbeiðsloysið er so høgt millum tey ungu. Í míni verð er tað arbeiðsloysi, tá tey ungu einki hava at fara til, sigur Albert Ellefsen.

Hann hevur áður verið frammi í miðlunum við stuðli sínum til eitt uppskot á tingi, um at geva loyvi til at innflyta rávøru, sum kann arbeiðast her á landi.

Í Miðvági er eitt fiskavirki, sum hevur havt turr gólv í langa tíð. Enn veit eingin um ella nær tað kann lata upp aftur. Vónað verður framvegis, at vinnulívsfólk í Vágum síggja møguleikarnar í virkinum, soleiðis at virksemi aftur verður á havnarøkinum.

– Tað verður nógv tosað, og so leingi ljósið lýsir, er ein vón, sigur borgarstjórin.



**DAGRØKT**

*Arbeiðið uppá nýggja barnagarðin í Miðvági hevur gingið væl. - Børnini sleppa inn higar á jólum, sigur Albert Ellefsen, borgarstjóri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Flyta inn á jólum

**MIÐVÁGUR Í januar mánaði í ár varð nýggi og stóri barnagarðurin á Stórutrøð í Miðvági reistur. – Vit ætla, at tey skulu sleppa at dansa jólatræ inni í barnagarðinum, sigur Albert Ellefsen, borgarstjóri**

Snorri Brend

Í løtuni verður arbeitt við at inniloka dagstovnin.

Fyri hesum arbeiði stendur byggifyritøkan KBH, sum skal gera arbeiðið fyri slakar fýra mió krónur.

Arbeiðið at inniloka snotuliga barnagarðin byrjaði í november í fjør, og skal verða liðugt um ein góðan mánað.

Upplýst verður, at tá innilokingin er liðug stendur bygningurin í 13 mió krónum. Samlaði kostnaðurin, saman við innbúgvinum er mettur til einar 25 mió krónur.

Pláss verður fyri 150 børnum, sum seinni í ár ætlandi sleppa í henda nýggja barnagarðin.

### 4000 krónur

Kommunan hevur annars í fleiri ár nøktað tørvin á barnaansing:

Í Miðvági eru børn yngri enn trý ár í dagrøkt; tey millum 3 og 5 eru í barnagarðinum í Gamla skúla, meðan tey 6 ára gomlu verða ansað í Heiðastovu. Frítíðaransingin heldur til á Gjónni.

Barnaansingin í Sandavági er í dag skipað soleiðis, at børn yngri enn 5 ár verða ansað í Sóljugarði, meðan tey 6 ára gomlu verða ansað í Sóljustovuni. Frítíðaransingin heldur til í frítíðar- og ungdómshúsinum á Loftinum.

At enda verða nevnt, at í 2008 kostaði ansingin 8,5 mió í Miðvági og 8,2 mió krónur í Sandavági.

Í fjør kostaði barnaansingin 17,8 mió krónur, umframt tað at kommunan rindaði 2,3 mió til barnaverndartænastuna og 500.000 krónur til ungdómshúsið Loftið.

At enda kann verða nevnt, at barnafrádrátturin í Vága kommunu er 4000 krónur fyri hvørt barnið.

### Skattaprosentið

hækkaði á nýggjárinum við einum hálvum prosenti. Í verandi fíggjarári er raksturin tálmaður í mun til 2009, meðan íløgurnar eru vaksnar. Fyri at fíggja íløgurnar hevur verið neyðugt við lántøku, sum aftur hevur ført til øktar rentuútreiðslur. Ein av stóru einstøku íløgunum í ár eru 14,3 mió krónur til at gera barnagarðin í Miðvági lidnan.